LM-003/2023

Fylgiskjal 2

Guðrið Dam Andreasen

Fra:	Katrin Gaard
Sendt:	týsdagur, 18. juli 2023 17:53
Til:	Nella Festirstein
Cc:	Heilsumálaráðið
Emne:	Svar: TIL UMMÆLIS: Uppskot til broyting í rúsdrekkalógini - rúsdrekkaframleiðarar fáa heimild at selja sína framleiðslu á framleiðslustaðnum. Freist 1. august.
Vedhæftede filer:	Uppskot til broyting í rúsdrekkalógini.DOCX; RÚSDREKKALÓGIN - galdandi og uppskotið (2).DOCX

Til Løgmálaráðið
Stílað: Nella Festirstein, aðalstjóri

Góða Nella,

Svar: TIL UMMÆLIS: Uppskot til broyting í rúsdrekkalógini – rúsdrekkaframleiðarar fáa heimild at selja sína framleiðslu á framleiðslustaðnum

Vísandi til niðanfyristandandi t-post frá Løgmálaráðnum tann 22. juni 2023 um at ummæla "Uppskot til broyting í rúsdrekkalógini – rúsdrekkaframleiðarar fáa heimild at selja sína framleiðslu á framleiðslustaðnum".

Í juni 2023 legði Norðurlendska Ráðharraráðið fram nýggjastu norðurlendsku føðslutilmælini, nevnd Nordic Nutrition Recommendations 2023. Integrating environmental aspects (https://pub.norden.org/nord2023-003/. Sambært norðurlendsku føðslutilmælunum verður mælt til, at fólk halda seg frá at drekka rúsdrekka. Drekka tey rúsdrekka, eigur tað at vera í sera avmarkaðum nøgdum. Børn, ung og kvinnur við barn skulu als ikki drekka rúsdrekka. Norðurlendsku føðslutilmælini byggja á vísindaligt støði hjá bæði norðurlendskum og altjóða granskarum og serfrøðingum.

Við atliti til fólkaheilsu eigur rúsdrekkanýtslan at vera mist møgulig. Virknastu amboðini at røkka hesum eru prísur og atkoma. Verður atkoman til rúsdrekka lættari, kann vandi verða fyri øktari rúsdrekkanýtslu.

Vinaliga/Sincerely

Katrin Gaard
Fulltrúi, Head of Section

Heilsumálaráðið / Ministry of Health
Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn, Faroe Islands
Tel. +298 304050 Mobile +298 734039 Fax +298 354045
Katrin.gaard@hmr.fo

Fra: Nella Festirstein <nellaf@lmr.fo>
Sendt: 22. juni 2023 14:08
Til: oy@oy.fo; fb@foroyabjor.fo; info@faer.fo; industry@industry.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; loyvisnevndin@rusan.fo; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fólkaheilsustýrið <hst@hst.fo>; heilbrigdi@heilbrigdi.fo; blakross@blakross.fo; rusan@rusan.fo